# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabbamein í penis

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um peniskrabba

Við hesum sjúkueyðkennum skal ávísast til krabbameinsútgreining:

- Nýuppstaðin misliting á glans penis
- Nýuppstaðin týðandi forhúðstreinging, ið merkir, at forhúðin ikki kann retraherast - saman við
  * Útflot
  * Bløðing

## Grundaður illgruni

Grundaður illgruni stendst av

- Sjónlig ella palpabul ífylla á penis
- Biopsi, ið vísur tekin til krabba ella forstadium til krabba

## Handfaring av residiv

- Í uppfylgingartíðini: Um tekin til residiv, so ávísa til urologiskt ambulatorium
- Eftir uppfylgingartíðina: Ávísing sendast til nýggja krabbameinsútgreining

Vandabólkar

- Phimosis
- Kroniskar inflammatoriskar sjúkur (balanopostitis, lichen sclerosus et atroficus (BXO))

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabbamein í penis" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026